# Fólkaflokkurin á løgtingi

## Vald umboð

Fólkaflokkurin varð stovnaður í 1939 sum ein samanrenning av Vinnuflokkinum og fólk úr Sjálvstýrisflokkinum, teirra millum Jóannes Patursson. Fólkaflokkurin hevur síðani hann varð stovnaður verið ein av størstu flokkunum á tingi. Á tveimum valum undir krígnum vantaði bert ein mann í at eiga meiriluta. Eftir seinna heimsbardaga, tá ið vit fingu eitt flokkamynstur við fýra stórum flokkum og so úr einum og upp í fleiri smærri flokkar, hevur Fólkaflokkurin verið ein av teimum fýra stóru. Tað minsta hann hevur fingið, var í 1994, tá ið hann fekk 16 %. Tað frægasta úrslitið var í 1950, tá ið flokkurin fekk 32,3 % og varð størsti flokkur – tað hevur flokkurin síðani bert roynt eina ferð aftur: í 1988 við 23,2 %. Fólkaflokkurin fekk á valinum í 2004 20,6% og hevur í dag 7 umboð á løgtingi.

## Mest niður í veljarakanningunum

Síðani seinasta løgtingsval januar 2004 hevur tað gingið mest niður í veljarakanningum. Á seinasta løgtingsvali fekk flokkurin 20,6 %. Í kanningunum síðani valið hava allar uttan ein í juni 2006 spátt afturgongd fyri flokkin. Úr 1 til 3 % afturgong. Tann seinasta hjá Fynd í hesum mánaðinum gevur flokkinum 18,4 %.

## Meðal hampa flokkur

Flokkurin er borgarligur flokkur. Liberalur og við sjálvstýri frammalaga í stevnuskránni. Hyggja vit at, hvussu veljaraskarin er samansettur sosialt, so síggja vit, at løntakaraveljararnir býta seg, so hann líkist landinum sum heild. Í so máta er býtið ímillum fólkafloksveljarar næstan ein spegilsmynd av landinum í síni heild. Sum ein flokkur, ið ger nógv burturúr at vísa fiskivinnuni og fiskimonnum ans, kundi tú kanska vænta, at sjómenn sóust betur aftur. Prosentvíst rúgva teir eitt sindur meira enn í samlaða veljaraskaranum undir einum. Men bert eitt vet. Sjálvandi: Hetta er heldur ikki júst tann samfelagsbólkurin, ið tekur lut í veljarakanningum, so tølini verða minni sum heild.

## Við í nógvum samgongum

Fólkaflokkurin er í løtuni í einari ABC-samgongu. Tað vil siga saman við Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum. Hann er ikki óvanur við at vera í samgongu. Næstur eftir Sjálvstýrisfokkin, er hann tann flokkurin ið hevur verið mestu tíðina í samgongu. Hann hevur verið í 13 av teimum 22 samgongunum, ið hava verið í eftirkrígstíð. Tað er ikki meira enn góð helvt, men Fólkaflokkurin hevur verið við í fleiri av teimum drúgvu samgongunum, so tá ið vit telja ár, so tosa vit um knappliga 38 ár tilsamans av umleið 59 árum. Samansetingin hevur verið so ymisk. Hann hevur luttikið í høgrasamgongum, stundum við miðjuflokkum afturat, sjálvstýrissamgongum umframt í trimum "stórum" samgongum. ACE saman við Javnaðarflokkinum og Tjóðveldisflokkinum 1975-1981. ABE saman við Sambandsflokkinum og Tjóðveldisflokkinum 1989-1991. Og so í sitandi ABC-samgongu. Harumframt hevur hann roynt aðrar samansetingar, eitt nú einsamallur saman við Javnaðarflokkinum 1991-1993.

## Tríggjar løgmenn

Fólkaflokkurin hevur átt løgmannin í 5 samgongum. Hákun Djurhuus í sonevnda Sjálvstýrislandsstýrinum aftur í 60-árunum. Jógvan Sundstein í 2 samgongum 1989-1991. Og so Anfinn Kallsberg í sonevnda Fullveldislandsstýrunum frá 1998-2004.



*Tveir av tingmonnum hjá Fólkaflokkinum. Óli Breckmann, formaður í tingbólkinum, og Heðin Zachariasen, sum eisini er borgarstjóri í Sunda Kommunu*

*Mynd: jens Kristian Vang*

| Løgtingsval | Veljarakanningar | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20.01.2004 | Juni 2006 | Des 2006 | Des 2006 | Jan 2007 | Mai 2007 | Aug 2007 | Sep 2007 |
| 20,6 | 20,5 | 18,7 | 19,8 | 18,8 | 18,7 | 17,4 | 18,4 |
| | Fynd | Gallup | Fynd | Gallup | Gallup | Gallup | Fynd |

**Undirtøka Fólkafloksins í veljarakanningum (%).**

positiva í at fáa útlendingar at gera íløgur í vinnulívið her á landi. Men akkurát fiskivinnan er serlig. Tað er so skjótt, at útlendingar fara avstað við øllum. Vandin er, at tann dynamikkurin, sum er, hvørvur. Saman við tilfeinginum. Men annars so vil eg siga, at júst á fiskivinnuøkinum hava vit einki at læra av ES. Teirra fiskivinna liggur í skeljasori. Hatta hava vit dugað nógv betur sjálvi.

*Fiskivinnan tykist at hava eina serliga støðu hjá Fólkaflokkinum. Og umvent. Vit síggja tað ikki bara í ES-spurninginum, men eisini í spurningum sum frádráttin hjá fiskimonnum og í sambandi við keyp og sølu av fiskirættindum. Hvussu ber tað til, at tað er blivið so?*

– Hjá einum flokki, sum er vinnuflokkur, er tað at hava umsorgan fyri høvuðsvinnuna heilt náttúrligt. At vit so eisini fáa viðurkenning og undirtøku frá hesum partinum av samfelagnum kunnu vit bara gleðast um. Tað hevur ivaleyst samband við, at vit eru tann flokkurin, ið hevur umsitið fiskivinnuna mest. Tað, at vit uttan at himprast hava tikið fiskidagaskipanina til okkum og vart hana bæði her á landi og úti í heimi, tað hevur verið við til at givið okkum eina stjørnu í hesari vinnuni. Fiskidagaskipanin, sum í mun til so mangar aðrar skipanir, er ein skipan, sum vinnan sjálv er komin við, hevur stóra undirtøku millum fólk í vinnuna. Tað er tað, sum ger hana so sterka samanborin við aðrar. Ja, og lat meg leggja afturat, at tað stríð, ið plagdi at vera millum veiðihættir, tað hoyrist lítið til tað, eftir at fiskidagaskipanin kom at virka. So eisini á hesum økinum hevur hon víst sítt virði.

*Tit eru eisini fremstu verjar av sjómannafrádráttinum. Tað gevur tykkum ivaleyst eisini undirtøku millum fiskimenn. Men er tað ikki í andsøgn við at vera ein liberalur flokkur? – At ein samfelagsbólkur fær serligar sømdir?*

– Eg haldi ikki, at tað er rætt at siga, at fiskimenn ella sjómenn fáa sersømdir. Aðrir samfelagsbólkar, ið fara av landinum í arbeiðsørindum, hava sínar skipanir. Alment lønt fáa dagpengar, tá ið tey eru burturi. Skattafrítt. Handverkarar hava sína skipan. Tað var tað, vit løgdu okkum eftir, tá ið vit fingu hesa skipanina fyri sjómenn. At fáa javnvág. Anfinn Kallsberg var landsstýrismaður tá og vildi hava eina skipan, ið gjørdi, at t.d. fiskimenn ikki vórðu harðari skattaðir enn í londunum rundan um okkum, har tað var heilt vanligt at geva sjómonnum skattafrádrátt. Tað hoyrir eisini við til myndina, at teir borgarar, ið eru nógv burturi, ikki kunnu njóta tað sama burtur av tí, ið tað almenna annars veitir sínum borgarum.

*Hesin spurningurin hevur saman við spurninginum um Sandoyartunnilin elvt til trupulleikar í samgonguni. Tit hava hildið uppá, at tað er rættari at spara í almenna rakstrinum enn í íløgunum. Tað reisir spurningin, um tit ikki seta vælferðina í váða?*

– Vit siga, at vit skulu halda aftur í økingini av útreiðslunum. Minst til, at tá ið vit tosa um landskassan, so eru 92 % rakstur og bert 8 % íløgur. So vit halda ikki, at tað er rætt at seta hesi átta prosentini upp í móti rakstrinum. Tað er talið nóg avmarkað til frammanundan. Men tey 92 prosentini, sum bara økjast, har er uppgáva at ansa eftir.

*Nú tað stundar til val, vil eg spyrja, hvørji mál, Fólkaflokkurin vil leggja serligan dent á at fáa framt?*

– Tá vil eg siga tað sosialliberala við øllum tí, tað inniber, m.a. skattalættar. Og at vit koma á mál við sjálvstýrismálinum.

*Búskaparsemjan, er hon partur av hesum?*

– Tað er hon, tó at mær hevði dámt best, at vit høvdu fingið hesa semjuna millum allar flokkar áðrenn valið. Helst við lóg.

*Hvørjar samgongumøguleikar hevur tú fremst í huganum?*

– Yvirhøvur haldi eg, at samgongur við trimum stórum flokkum roynast frægast. Fólkaflokkurin hevur verið í samgongu við hinar tríggjar av teimum stóru, so har eru fleiri møguleikar.

*Um tit koma í samgongu aftur, hvørji málsøki vilja tit so serliga leggja tykkum eftir at fáa at umsita?*

– Eg síggja soleiðis uppá tað, at hatta má valdast, hvat ið vit fáa við í samgonguskjalið. Har, sum vit fáa okkara politikk í samgonguskjalið, hevur tað ikki somu neyð at fáa málsøkið at umsita. Tá er frægari at fáa eitt málsøki, har politikkurin hjá okkum ikki er komin so týðiliga til sjóndar í samgonguavtaluni.